# Music of the Northlands

**Konsert í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 21.10.02, kl 19.30**



UMMÆLI
*Hans Egholm*

Lívligur fólkatónleikur í Klingruni…….

Mánakvøldið var konsert í Norðurlandahúsinum við fólkatónleikarum frá fleiri londum, ið saman mannaðu ein verkætlanarbólk ið nevnir seg ”Music of the Northlands”, og føroyski parturin er Føroya Fólkatónleikarafelag, ið hevur eitt umboð við, Angeliku Nielsen úr Vestmanna.

Talan er um eitt samstarv, har 7 tónleikarar, ein úr hvørjum landi, spæla fólkatónleik og eru hesi nú á tónleikaferð til tey lond tey umboða.

Tónleikarirnir, ið koma úr Danmark, Norra, Svøríki, Wales, Írlandi, Skotlandi og Føroyum, spældu traditionellan fólkatónleik, einamest frá teirra egnu heimlondum.

Tey, ið mannaðu bólkin hetta kvøldið vóru, - á fíol, Angelika Nielsen úr Føroyum, Henrik Jansberg úr Danmark, Sophia Eriksson (viola d´amore) úr Svøríki og Synnøve Bjørset (hardangerfíol) úr Norra.

Guitarleikarin er úr Wales og nevnist hann Dylan Fowler.

Úr Onglandi er ein ið nevnist Robert Harbron ið leikaði á guitar og, um okkara leiðir, sjáldsama ljóðføri concertino. Hetta ljóðførið er at líkna einari heilt lítlari harmoniku, men verður tó ikki borin, men hvílur á lærinum hjá leikaranum, meðan spælt verður.

Síðsti tónleikarin í hesum bólkinum er úr Írlandi og nevnist Gavin Whelan og leikar hann á ymsar floytur.

Hóast konsertin var mánakvøldið, tá Dagur og Vika og ”Robinson” eru á skránni í sjónvarpinum, var rættuliga fitt av fólki møtt upp í Klingruni.

Føroyska umboðið í ”Music of the Northlands” er, sum fyrr nevnt, unga og evnaríka vestmannagentan Angelika Nielsen, ið leikar á fíol.

Tey ið ikki vita hvør hendan Angelika Nielsen er, kann nevnast, at hon var fiól leikarin í Spælimannsbólkinum í sjónvarpsendingini, Borð um borð hjá svf sunnukvøldið.

Konserrtin var góð, - har var onki hóvasták gjørt burturúr og leikarirnir vóru ógvuliga væl fyrireikaðir, og spælt var uttan nótar.

Tónleikararnir sótu saman, líkt einum hestaskógvi, ið hóskar væl til hetta slag av tónleiki, - ein spennandi samanseting av ymsum ljóðførum.

Fyrsta lagið á konsertini var ein lívligur valsur, har øll ljóðførini vóru við, og tað sást og hoyrdist beinavegin at tónleikararnir høvdu roynt hettar áður, flott samanspæl.

Síðan komu fleiri løg, har tónleikararnir hvør í sínum lagið greiddu eitt sindur frá um upprunan ella íblásturin til ávísu løgini, ið blivu framførd av nøkrum av tónleikarunum, alt eftir hvat slag av tónleiki talan var um.

Fleiri av løgunum vóru vals og polka kend.

Eitt nú spældi Angelika eitt sera áhugavert lag, ið Svabo í sínari tíð skal hava skrivað og tí kom hon sera væl frá, - eitt lívligt lag við góðum walisiskum guitarspælið afturvið.

Concertino er sjáldsamt ljóðførið her um leiðir og hóskaði sera væl til hesa samanseting av ljóðførum, tað sama má sigast um írska floytuspælið, ið veruliga setti dám á tónleikin hetta kvøldið.

Av tí at concertino og partvíst floytuspæl sjáldan eru at hoyra í tílíkan mun sum hetta kvøldið, var serliga lagt til merkis hesi ljóðførið, ið leikarar so meistarliga dugdu at handfara.

Fiólirnar hóskaðu sera væl saman við restina av ljóðførunum, - har var flott samanspæl við sera nógvari ferð á fleiri av løgunum.

Hóast konsertin var útvið tveir tímar til longdar, við einum steðgi ið vardi 20 minuttir, so merktist hetta als ikki.

Samanumtikið var talan um sera góðan, fjølbroyttan og væl samansettan fólkatónleik.

Tórført er at taka nakran av tónleikarunum framum, øll spældu tey ógvuliga væl. Tey framførdu tónleikin við lív og sál í avslappaðum umhvørvi og pláss var eisini til eitt sindur av skemti ímillum løgini, - herligt.

Tá endin er góður, er alt gott, og so var, áhoyrarirnir fingu eitt frálíka gott eykanummar at fara heim uppá.

Stutt sagt, dugnaligir tónleikarar, ið veruliga duga síni ting út í fingraspíssarnar.





# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 25. oktober til hósdagin 31. oktober**

## Bíblian – Ábraham




– Týsk/italsk stuttrøð

Guð gevur Ábrahami lyfti: Hann skal vera ættfaðir, men tað vísir seg, at kona hansara, Sára, fær ongi børn; fólk Abraham hevur heimstað í Kánans landi – men turkur noyðir tey til Egyptaland.

Leikarar: Richard Harris, Barbara Hershey, Maximilian Schell.

Leikrit: Robert McKee.

Leikstjórn: Joseph Sargent.

Stuttrøðin er í tveimum pørtum, fyrri partur fríggjakvøldið kl. 22.25 og seinni partur verður sendur sunnukvøldið kl. 21.40. – Óhóskandi fyri smábørn.

## Panorama

Leygardagin 26. oktober fer Útvarpið undir eina nýggja seinnapartssending, sum verður á skránni leygardagar.

Í sendingini verður ymiskt brúkaratilfar á skránni, umframt tilfar, sum hoyrir vikuskiftinum til.

Sendingin hevur fingið heitið »Panorama«, tí redaktiónin vónar, at sjónarringurin hjá lurtarunum er víðkaður eitt sindur eftir, at klokkan er farin av fýra leygardagar – hvønn leygardag.

Í fyrstu sendingini verður ein bilur testaður. Greiða fæst á, hvussu tilfar kann slettast úr eini teldu. Fimm spurningar verða settir einum kendum persóni um internetnýtslu. Ringt verður til eitt av okkara grannalondum fyri at frætta, hvørji tíðindi hava sett lit á tíðindaflutningin hesa vikuna. Harumframt verður eisini vitjað hjá einum persóni fyri at vita, hvussu viðkomandi vanliga brúkar vikuskiftið.

Hetta er nakað av tí, sum verður á skránni í »Panorama« leygardagin.

Hoyrið meira leygardagin kl. 14.00 í Útvarpi Føroya.

Bjarni Mohr leggur til rættis.




## Spyr Harran fyrst




## Fólk og frítíð




## Okkara kokkar




## Beethoven

